## Danir fíngið fíggjarlóg

Við einum óvanliga stórum meiriluta samtykti Fólkatingið fyrrapartin donsku fíggjarlógina fyri 2010. Allir flokkar uttan Eindarlistin atkvøddu fyri uppskotinum, sjálvt um flokkarnir í verileikanum eru rættiliga ósamdir um tann búsksparliga politikkin. Eitt nú vildu Sosialdemokratarnir hava 13 milliardir krónur til ein vakstrarpakka, sum skuldi tálma tí veksandi arbeiðsloysinum, men tað vildi Danski Fólkaflokkurin ikki hoyra talan um. Danska fíggjarlógin fyri 2010 hevur 94 milliardir krónur í halli



## Donsk neyðsemja

Danska stjórnin hevur givið londunum á veðurlagsráðstevnuni ein seinasta møguleikat at semjast um eina avtalu. Í morgun ljóðaði annars, at danska stjórnin var givin við royndunum at fáa eina avtalu í Keypmannahavn. Ein dnsk samráðingarkelda segði við DR, at tað eydnaðist ikki danska formansskapinum at fáa nóg stóra undirtøku fyri einum neyðsemjuuppskoti, sum Danmark ætlaði at leggja fram, og at tí hevði stjórnin slept endanum. Seinni varð fráboðað, at Danmark hevur ikki slept endanum, men hevur givið hinum londunum ein seinasta møguleika.

## Byrja upp á røktarheimið í februar

**Vestmanna kommuna bíðar nú bara eftir svari frá Fíggjarmálaráðnum og frá einum fíggjarstovni. So er klárt at fara undir at byggja røktarheimið**

ELDRARØKT
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Gongur sum ætlað, verður spakin settur í fyri røktarheiminum í Vestmanna í februar mánaði.

Tað sigur Karl A. Olsen, borgarstjóri.

Kommunan hevur munnliga fingið loyvi til at økja um skuldina, so hon fer upp um eina álíkning. Bíðað verður nú eftir skrivliga svarinum frá Fíggjarmálaráðnum, og tá ið tað er komið, fær kommunan endaligu tilsøgnina frá Almannaráðnum.

Ein fíggjarstovnur hevur játtað kommuni fígging, og kommunan væntar fyrsta dagin at fáa svar frá einum øðrum stovni.

Kommunan varð noydd at skerja fíggjarætlanina nakað í ár, so hon gevur eitt størri yvirskot. Tað var kravið.

Verandi skuld hjá Vestmanna kommunu er 32 mió. krónur, og kommunan fær loyvi til at læna upp í 22 mió. krónur aftrat. Álíkningin liggur um 38 mió. krónur.

Landið letur 700.000 krónur fyri hvørt plássið, samanlagt 16,8 mió. krónur.

Karl A. Olsen sigur, at ætlanin er at gjalda skuldina niður so skjótt sum á nakran hátt ber til.

Nú verður farið at gera útbjóðingartilfarið klárt.

Tað hevur alt eitt sindur av skundi, tí røktarheimi, sum fer at hava 24 pláss, skal standa liðugt seint í 2011 ella fyrst í 2012.

# Nógv fáa neyðhjálp í Føroyum

**Higartil hava 170 familjur biðið um mat til jóla frá felagsskapinum Hjálpin, og tað er væl fleiri enn seinasta ár**

JÓLAHJÁLP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

So langt frá øll fólk eru so frægt fyri, at tey hava ráð at keypa sær góðan mat til jóla.

Tað veit Leif Erik Niclasen, oddamaður í felagsskapinum Hjálpin, betur enn nakar.

Hvønn einasta dag í árinum koyrir hann mat út til folk, sum líða neyð. Fyri tað mesta er hetta matur, sum handlar og heilsølur hava givið honum til tað sama.

Nú tað stundar til jóla, hevur Leif Erik Niclasen uppaftur meira at gera við at savna mat saman at geva neyðstøddum.

- Higartil eru tað 170 familjur, sum vilja hava hjálp frá okkum til jóla, sigur Leif Erik Niclasen.

Hetta er væl fleiri enn tey, sum fingu frá Hjálpini til jóla í fjør. Eini 25 prosent fleiri.

Hann heldur orsøkina til stóra eftirspurningin partvís vera, at fleiri nú vita um møguleikan, men tað stendur eisini nógv verri til hjá fleiri nú.

- Støðan er nógv verri í ár hjá nógvum familjum. Fleiri eru arbeiðsleys, inntøkan er tí minni, men húsaleigan skal gjaldast. Tá ið tey, sum leiga út, fara niður í løn, hækka tey leiguna, og soleiðis gongur tað, sigur Leif Erk Niclasen.

Tey, sum ringast eru fyri, ringja ikki til hansara og biðja um hjálp. Onnur ringja fyri tey.

Tað eru eisini tey, sum ikki duga at húsast, og tí ikki fáa peningin at røkka. Ella tey raðfesta løgið.

- Eg sigi sum so, at tá ið eg komi til eini hús við mati og síggi ein stóran fínan bíl í túninum, fari eg ikki inn, sigur Leirf Erik Niclasen.




*Leif Erik Niclasen er oddamaður í Hjálpini, sum eisini hevur hjálpt russarum*

### Fráboðanarskipan

Hann hevur í hyggu at fara út at tosa við allar borgarstjórarnar í landinum fyri at fáa okkurt slag av fráboðanarskipan, tí teir skuldu vita lokalt, hvør líður neyð.

Leif Erik Niclasen heldur tað vera alla æru vert, at vit senda hjálp til neyðstødd í fátækum londum, men tað er eisini gott, at felagsskapir í Føroyum taka móti brúktum klæðum at selja fyri lítið og lætt, tí tað kemur væl við hjá nógvum.

Ein stóran part av matinum, sum Hjálpin býtir út, fær hann frá handlum og heilsølum, men hann heldur tað vera spell, at summar heilsølur heldur vilja koyra vørur burtur, ið kanska hava fingi ein snudd, heldur enn at lata vørurnar til illa stødd fólk. Vørunum bagir einki, fyri tað um pakningurin ikki er heilur. Kjøtvørurnar keypir hann, og hann hevur fingið loyvi at goyma tær í frotsrúmi hjá Skipafelagnum, til tær verða koyrdar út.

# Øll fingu úr Barnahjálpargrunninum

**Barnahjálpargrunnurin letur í ár stuðul til øll børnini, sum søkt varð um stuðul til**

HJÁLP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Familjur, sum eru illa staddur pengaliga, hava møguleikan at søkja Barnahjálpargrunnin um hjálp til børnini. Stuðulin verður útgoldin beint upp undir jól.

Í ár komu 43 umsóknir inn, og nevndin fyri grunnin samtykti mánakvøldið, at játta øllum umsóknunum, og at øll børnini skuldu fáa somu upphædd.

1500 krónur fær hvørt barnið, uttan mun til, um bara eitt barn var í familjuni, ella systkinaflokkurin var stórur.

Beinta H. Jacobsen, forkvinna í grunninum sigur, at umsóknirnar í ár vóru nakrar fleiri enn í fjør, men hon hevði væntað væl fleiri umsóknir, nú minni arbeiði er, og so nógv fólk eru arbeiðsleys.

Stuðulin í ár varð fíggjaður av rentuinntøkum og tí einastu gávuni, sum grunnurin hevur fingið seinasta árið.

Beinta H. Jacobsen sigur, at nú rentan er so lág, er rentuinntøkan lítil, og áður fekk grunnurin eisini ofta gávur frá fleiri stovnum.

- Fær Barnahjálpargrunnurin ikki fleiri gávur, verða vit noydd at taka av stovnsfænum, sigur hon.

Barnahjálpargrunnurin varð stovnaður í 1942, tá ið fleiri børn mistu pápan á sjónum.

Áður skuldu tey, sum søktu, hava váttan frá kommununi. Nú er tað læknar, prestar og samkomuleiðarar, sum vátta.

# Gravgangur eftir jólahjálp

**SMS hevur játtað 100 familjum gávukort í jólahjálp**

JÓLAHJÁLP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin*

- Tíverri søktu so nógv.

Hetta sigur Niels Mortensen, stjóri í SMS, sum fyri fyrstu ferð hevur býtt út jólahjálp.

Miðan november lýsti SMS við, at fólk kundu søkja um jólahjálp frá sølumiðstøðini.

Hóast tíðin at søkja bara var tríggjar vikur, komu 133 umsóknir inn, og 100 av teimum vórðu játtaðar.

Tær 100 familjurnar hava fingið bræv við gávukorti áljóðandi 1000 krónur frá SMS.

- Hetta er ikki nakað marknaðarføringstiltak. Vit gera tað fyri at geva eitt sindur aftur og fyri at hjálpa fólki, sum illa eru fyri. Jólahjálpin er eitt gamalt hjartamál hjá mær, sigur Niels Mortensen.

Sjálvur veit hann ikki, hvørji fólk hava fingið hjálp. Ein nevnd við trimum fólkum fekk uppgávuna at taka støðu til umsóknirnar, og eingin annar veit, hvørji hava søkt.

- Eg veit tí einki, men tað er mín fatan, at serliga einligar mammur sita hart í tí. Tær hava tað nógv verri her enn aðrastaðni, sigur Niels Mortensen.